## Starvsfólk til Sjúkraflutningstænastuna

Á Sjúkraflutningstænastuni eru 2 fulltíðarstørv leys at søkja til setan frá 15. apríl 2010 til 14.apríl 2011.

Sjúkraflutningstænastan er ein deild við nógvum ymiskum uppgávum. Ein av høvuðsuppgávunum er at vera ein bráðfeingishjálp í samband við lívbjargandi arbeiði. Harnæst er uppgávan flutningur av sjúkum og skaddum fólki og fólkum, ið eru rørslutarnað. Eisini hevur sjúkraflutningstænastan ábyrgd av øllum portørarbeiði, ið er á Landssjúkrahúsinum. Alt hetta setir stór krøv til starvsfólkið, sum mangan kemur at arbeiða undir serstøkum umstøðum.

Starvsøkini hjá Sjúkraflutningstænastuni fevna um Streymoy, Eysturoy, Vágar og Sandoy. Her starvast í løtuni umleið 35 fólk. Deildin hevur 14 bilar, íroknað 10 sjúkrabilar. Vaktsentralurin, ið hoyrir til deildina, er saman við sjúkrabilunum á hvørjum starvsøki mannaður alt samdøgrið.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða út frá støðini í Tórshavn, Vágum og Eysturoynni í skiftandi vaktum og fær neyðuga upplæring í samband við starvið.

Nýsett starvsfólk skulu hava grundskeið / upplæring í uml. 14 dagar, áðrenn tey kunnu virka sum hjálparfólk í sjúkrabilinum. Tey skulu hava vegleiðing frá einum viðgerða og hava møguleikar fyri øðrum grundskeiðum, ið eru neyðug, fyri at røkja starvið til fulnar. Sjúkraflutningstænastan krevur, at tann, ið settur verður, skal upp til eina praktiska roynd í lívbjargandi arbeiði einaferð um árið fyri at tryggja, at tænastan livir upp til eitt dygdargott arbeiði.

**Vit vænta, at tú:**
- ert tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni
- kanst síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- hevur evni til at orða teg bæði munnliga og skrivliga
- kanst taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt
- skalt verða fús/ur til at broyta teg við nútíðina
- hevur góðar koyrieginleikar

**Førleikarkrøv:**
- Koyrikort til vanligan bil
- Hevur fylt 21 ár
- Reina revsiváttan
- Hevur prógv í 1. hjálp
- Maður hædd: minst 170 cm (uttan fótbúna)
- Kvinna hædd: minst 165 cm (uttan fótbúna)
- Maður skal lyfta 50 kg yvir bringuhædd
- Kvinna skal lyfta 30 kg yvir bringuhædd
- Góðan fysik/heilsu (skal váttast av lækna)
- Vanliga hoyrn og vanliga litsjón (skal váttast av lækna)
- Telduførleiki á brúkarastøði

Í samband við starvsfólkapolitikkin og virðisgrundalagið hjá sjúkraflutningstænastuni skal tann, ið settur verður, lúka øll krøv, í tænastan krevur. Sjúkraflutningstænastan leggur stóran dent á trivnað og menning.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Jákup Nolsøe, leiðara, telefon 304501 ella til Gunnar Hjelm, varaleiðara, telefon 304502.

**Umsóknarfreistin er 26. mars 2010 kl. 12.00**

Sosialurin / KvR 34 18 00

## Leiðandi yvirlækni

Starvið sum leiðandi yvirlækni og depilslækni til Medisinska depilin er leyst at seta skjótast gjørligt ella eftir avtalu.

Medisinska depilsleiðslan er samansett av leiðandi yvirlæknanum og leiðandi sjúkrarøktarfrøðinginum. Medisinski depilin er skipaður í 4 seingjarøki við hvør sínari deildarleiðslu. Harútyvirambulatoriir, fysioterapi, ergoterapi og skrivarar. Umleið 150 ársverk eru á Medisinska deplinum.

**Ábyrgdarøki**
Sjúkrahúsleiðslan hevur ta yvirskipaðu ábyrgdina av samlaða rakstrinum. Leiðandi yvirlæknin hevur saman við leiðandi sjúkrarøktarfrøðinginum ábyrgdina av leiðsluni av Medisinska deplinum.

Landssjúkrahúsið leitar eftir einum sterkum og treystum leiðara við góðum yvirliti og góðum evnum til at taka avgerðir. Tað hevur stóran týdning, at tú bæði hevur hug og evni til at samarbeiða í eini toymisleiðslu, har trúfesti (loyalitetur) og opinleiki eru grundarlag fyri avgerðum og gerningum, sum depilsleiðslan tekur í muntilstrategiinahjáLandssjúkrahúsinum. Leiðarin hevur ábyrgdina av starvsfólkaleiðslu, fakligari menning og førleika fyri allar starvsfólkabólkar í deplinum. Tað er av stórum týdningi, at depilsleiðslan ígongdsetir, stuðlar og tekur ein aktivan lut í gransking hjá deplinum, bæði læknafakliga og tvørfakliga.

Depilsleiðslan skal planleggja, samskipa og fáa sum mest burturúr rakstrinum og tilfeingisnýtsluni, soleiðis at tað verður veitt ein so góð tænasta til brúkaran sum møguligt innan teir til eina og hvørja tíð galdandi karmar. Umsøkjarar skulu vera greiðir yvir, at ein týðandi partur av starvinum hevur leiðsluuppgávur við sær.

**Arbeiðsuppgávur**
- Tryggja karmarnar fyri dagliga rakstrinum og starvsfólkatrivnaðinum
- Seta mál fyri depilin og eftirmeta tey, herundir eisini serfrøðina hjá deplinum
- Seta gransking í gongd, góðskutrygging og menning fakliga og tvørfakliga
- Verkseta gjørdar sjúklingagongdir

**Førleikakrøv**
- Medisinskur serlækni innan relevanta serfrøði
- Leiðsluroyndir í minsta lagi frá fyrisitingarligum yvirlæknastarvi
- Leiðsluútbúgving og fíggjarligt innlit ella útbúgving ella vilja til at gjøgnumføra hetta
- Royndir við leiðslu av broytingartilgongdum
- Dugnaligur at útbýta tilfeingið innan depilin, bæði starvsfólk og annað tilfeingi.
- Evni til at hugsa og handla strategiskt og langskygt
- Kunna planleggja og strukturera mannagongdir og arbeiðshættir hjá deplinum
- Gjarna kliniskar royndir frá fleiri sjúkrahúsum

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið er áramálssett til 6 ár og kann leingjast eftir avtalu í upp til 3 ár.

Starvið verður innskipað eftir avtalu við FAS og Fíggjarmálaráðið.

**Aðrir upplýsingar**
fáast við at venda sær til Tummas í Garði, varastjóra og yvirlækna á telduposti lstumga@ls.fo telefon +298 234592 ella Bente Wennerberg, menningarstjóra, teldupost bw@ls.fo telefon +298 234598

Skjalprógv fyri útbúgvingar, serlæknaloyvisbræv og vísindaligt arbeiði í uppruna eintaki skal verða við í einari møguligari samrøðu.

**Umsóknarfreistin** er 30. mars 2010.
Samrøður verða mikudagin tann 7. april 2010.

## Leiðandi ergoterapeutur

Starvið, sum leiðari í Ergoterapiini á Psykiatriska Deplinum er leyst at søkja frá 1. mai 2010 ella skjótast gjørligt. Royndartíð á 3. mðr.

Starvið er 40 timar. Møguleiki er fyri niðursettari tíð.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss, sum er í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Um Ergoterapiina**
Psykiatriska Ergoterapiin er frá 1. januar 2010 flutt fyrisitingarliga frá Medisinska Deplinum til Psykiatriska Depilin.

Á Psykiatriska Deplinum arbeiða 4 ergoterapeutar, íroknað leiðaran.

Psykiatriski Depilin er í gongd við bygnaðarbroytingar, sum m.a. merkja, at arbeitt verður við at skipa virksemið í toymir og neyðugt er, at leiðarin gerst virkin partur av hesum, soleiðis, at ergoterapi hevur virknan leiklut í nýskipan av viðgerðartilboðum.

**Um arbeiði:**
Ergoterapiin á Psykiatriska Deplinum viðger brúkarar frá øllum psykiatriskum viðgerðardeildum umframt ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini, og veita tænastu til ymisk toymir á Psykiatriska Deplinum.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi starv við fjølbroyttum arbeiðsuppgávum
- Eitt arbeiðspláss í menning, har tú hevur góðan møguleika at mynda gongdina
- Eitt fakligt mennandi umhvørvi við ágrýtnum starvsfeløgum
- Eitt arbeiðplass við fastari avtalu sum praktikkpláss fyri ergoterapeutlesandi úr University College Vest Professionshøjskole
- At gerast partur av leiðslutoyminum

**Arbeiðsøkið hjá leiðandi ergoterapeutinum:**
- Fyrisitingar uppgávur og dagliga leiðslu av Ergoterapiini á Psykiatriska Deplinum
- Samskipa tær ergoterapeutisku arbeiðsuppgávurnar á psykiatriska økinum
- Luttaka í viðgerðini av brúkarunum
- Halda seg kunnugan við menningina innan ergoterapi
- Ráðgeva og vegleiða starvsfólkunum í Ergoterapiini.

**Vit vænta, at tú:**
- ert væl fyri fakliga og heldur teg kunnaðan innan menning í ergoterapeutiska fakinum
- er áhuga/ur í, hvussu ergoterpi kann gagnnýtast á Psykiatrisa Deplinum
- hevur leiðsluroyndir, ella sinnað/ur at tilluta tær
- ynskir at arbeiða við og menna tínar førleikar innan leiðslu
- hevur ein týðuligan, motiverandi og opnan leiðsluhátt
- megnar at skapa fakligar og sosialar karmar í Ergoterapiini, sum tryggja menning og trivna fyri starvsfólkini
- hevur áhuga fyri og positiva tilgongd í samstarvinum við aðrar deildir og fakbólkar
- hevur yvirlit, árræði og er før/ur fyri at samskipa og raðfesta ergoterapeutisku arbeiðsuppgávurnar
- dugir væl at orða teg skriftliga og munnliga

Av persónligum eginleikum leggja vit dent á ábyrgdarkenslu, fleksibilitet, greiða talu og humor.

**Nærri fæst at vita** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Súsannu Winther Poulsen, virkandi deildarergoterapeut, tlf. 304500, lokal 5785.

**Umsóknarfreistin er 26. marts kl. 12.00**

n er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo